# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Framsýning av myndum í Smiðjuni

**Hósdagin 24. november læt ein myndaframsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík í Havn. Tað eru tær báðar Kari Roarsdóttir og Estrid Christensen, ið sýna fram**



*Frá 24. til 29. november hava Estrid Christensen (v.m.) og Kari Roarsdóttir eina myndaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

**FRAMSÝNING**
*Barbara Tausen*
*Lena R. Guttesen*

Hetta er ein annarleiðis framsýning við t.d nattúrmyndum og fletting av seyði, eisini sýna tær tað, tær kalla »ikonskitser«. Alt er gjørt við oljukriti, vatnlitum og akrylmáling. Framsýningin er opin hvønn dag frá 14-20.

Kari er annars úr Noregi, og hevur hon áður havt framsýningar har. Estrid er úr Danmark, har hon hevur havt onkrar framsýningar, og nú er hon so komin til Føroyar at hava hesa framsýningina.

Uttan um listaheimin starvast Kari sum urtagarðskvinna og Estrid sum fulltíðar listafólk í Danmark. Framsýningin er opin til og við týsdagin 29. november.

Losjan Støt Viljen 100 ár:

## Losjurnar altíð havt stóran týdning

**Hósdagin 24. november var móttøka í Losjuni við Tinghúsvegin í Havn í sambandi við at nýggja bókin »Losjan Støt Viljen 100 ár« varð løgd fram. Tað er Erling Isholm, sum hevur skrivað bókina**



*Erling Isholm hevur ritstjórnað og lagt bókina »Losjan Støt Viljen 100 ár« til rættis*

**MÓTTØKA**
*Myndir:*
*Magnus Gunnarsson*

Fitt av fólki var komið saman til móttøkuna í Losjuni í Havn, tá nýggja bókin »Losjan Støt Viljen 100 ár« var løgd fram.

Jákup Lindenskov, formaður í losjuni, beyð øllum at vera vælkomin, og í nýtum orðum takkaði hann Erling Isholm fyri vælaverk. Eyðbjørg Joensen, næstformaður í losjuni, ynskti eisini Erlingi tillukku frá losjuni við vøkrum blómuprýði. Millum tey sum hildu røðu undir móttøkuni bar Sigfríður Joensen úr Gøtulosju eina heilsan fram, og Sverri Steinhólm, formaður í Blákrossi Føroya, røddi um týdningin losjurnar hava, og var hann sera fegin um at hetta bókaverk var komið út.

Bókin er um losjuna »Støt Viljen« í Havn, men sum heild viðgerð bókin losjurnar um alt landið, eisini barna- og ungmannafeløgini. Talan er um bókaverk á 375 blaðsíður, sum lýsir søguna hjá felagsskapinum. Losjuni í Havn, sum varð stovnað hin 1. mai í 1902.

Erling Isholm í Havn hevur ritstjórnað og lagt bókina til rættis í tøttum samstarvi við losjulimirnar: Jákup Lindenskov, Tórbjørn Mikkelsen og Hendrik Rubeksen. Forlagið Mál & Mentan hevur givið bókina út.

Stórt tal av myndum lýsa viðurskifti, sum tey tá vóru og eru rættuliga áhugaverdar í mongum føri.

Í bókini er skrá yvir kunninganotur, keldur, navnalisti, listi yvir myndaánarar. Rættuliga neyvt lýsir bókin partar av siðsøgu okkara og innlit í felgaslív, sum tað var í øldini farnu í tíðarbilum, tá samfelagið var rættuliga lítið øðrvísi, enn tað hevði verið í øldir - serliga ferðalíkindi, samband millum bygdir og oyggjar. Bókin kostar 325 krónur í sjáldsama fagurlittari permu.



*Erling Isholm hevur skrivað bókina í tøttum samstarvi við losjulimirnar: Jákup Lindenskov (v.m.), Hendrik Rubeksen og Tórbjørn Mikkelsen*

### Andlát og jarðarferðir

**Anna Joensen,** Klakvík, vanliga nevnd Anna á Dalinum, andaðist á Norðoya røktarheimi 26. nov., 81 ára gomul. Kistan fer úr kapelinum mánakvøldið klokkan 19. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni týsdagin klokkan 13.

**Ingálvur av Reyni,** Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 26. nov., 84 ára gamal.

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara elskaða kona, mamma, vermamma og omma

**Elly J. Bláhamar**
Vestmanna

andaðist sunnukvøldið 27. november, 65 ára gomul.

Farið verður úr kapellinum mikudagin kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju týsdagin kl. 13.00.
Sungið verður úr sálmabókini.

*Fyri tey avvarðandi*
**Anfinn, Anna Maria og Fríðálvur**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæra kona, mamma, omma og langomma

**Elna Clementsen,**
Skopun

doyði og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir.
Tøkk øll tit, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðini og við ervið.
Takk til prestar, berarar, bilføraran, organist, sangarar og gravarar.
Og tøkk til tey á Sambýlinum á Skerðinum.
Hjartaliga tøkk øll somul.

**Maður og synirnir**
**Gunnar og Tollak við familjum**

**Dagurin í morgin**

**30. november. Andrasarmessa.** Um lærusveinin Andrias sigur apokrýfisk søgn, at hann, tá ið ápostlarnir skiltust, fór sum trúboðari til Grikkalands og um svartahavsleiðirnar. Hann noktaði fyri at tæna skurðgudunum og varð krossfestur. Krossurin hann var hongdur á, var settur saman á skák, og ein tílíkur krossur hevur síðani verið róptur andrasarkrossur.

Á kirkjubøstólunum við træskurðinum av Andrasi er hann avmyndaður við hesum krossi. Andras hevur verið høgt mettur sum halgimenni t.d. í Russlandi og Skotlandi, og vit vita, at minningardagur hansara, 30. november, eisini hevur verið hildin í Føroyum.

Navnið er grikst og merkir maður.